Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Radiosignal í Viðareiðistunlinum

Spurningar:

1. Hvat er kostnaðurin fyri at seta radiosendarar upp í Viðareiðistunlinum?
2. Hvussu verður hetta arbeiðið raðfest av Landsverki?
3. Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at fáa radiosendarar upp í Viðareiðistunlinum, soleiðis at tunnilin verður nútíðarhóskandi?

Viðmerkingar:
Viðareiðistunnilin bleiv liðugur í september 2016 og er næst nýggjasti fjallatunnil eftir Hvalbiartunnilin. Hóast hetta hevur gott fimm ára gamli tunnilin onki radiosignal. Allir aðrir tunlar verða bygdir við radiosendarum í dag. Av hesi orsøk verður spurt um radiosendara til Viðareiðistunnilin.

Á Løgtingi, 15. mars 2022

Steffan Klein Poulsen